## Bæði avreiðingarnøgd og -virði minkað

Fyrsta ársfjórðing 2008 er avreiðingarnøgd og -virði minkað fyri nærum øll fiskasløg í mun til sama tíðarskeið 2007. Talan er um eina minking upp á 14% í nøgd og 21% í virði. Av botnfiski er avreiðingarnøgdin minkað 16% og -virðið 19%. Tað er serliga fyri hýsu og upsa, at minkingin er, meðan ein lítil framgongd sæst fyri toskin. Flatfiskurin minkar eisini ávikavist 20% í nøgd og 35% í virði. Í hesum bólki er tað havtaskan, sum minkar munandi bæði í nøgd og virði. Harafturímóti er nógv meira av svartkalva komið upp á land fyrsta ársfjórðing 2008 í mun til sama tíðarskeið 2007. (www.hagstova.fo)



# Altjóða seminar um stron

**Í gjár varð skipað fyri altjóða seminari ella evnisdegi í Norðurlandahúsinum, har evnið var strongd hjá sjófólki. Á skránni vóru framløgur, bæði við føroyingum og útlendingum. Tað var landsstýrismaðurin í fiskivinnu-og tilfeingismálum, Tórbjørn Jacobsen, sum setti dagin**




SEMINAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hevur síðan 2001 verið limur í altjóða felagsskapinum IASST, sum stendur fyri International Accociation for Safety and Survival Training. Endamál hjá hesum felagsskapi er at savna veitarar av trygdarskeiðum í felagsskap.

Í dag eru umleið 130 limir í felagsskapinum, býttir yvir 43 lond, har Stórabretland er tað landið, sum hevur flestu umboðini.

IASST hevur tveir árligar fundi, sum eru ymsastaðni í heiminum og í 2004, tá fundurin varð hildin í Hull, varð gjørt av, at Føroyar skuldu verða vertur fyri várfundinum í 2008.

Í gjár var so hesin fundur – ella evnisdagur – hildin í Norðurlandahúsinum.

Tað var landsstýrismaðurin í fiskivinnu-og tilfeingismálum, Tórbjørn Jacobsen, sum setti dagin, og síðan beyð formaðurin í IASST, Hilmar Snorrasson, vælkomin.

Eftir formellu byrjanina, varð lagt fyri við framløgunum, sum tilsamans vóru fimm í tali.

Fyrstur var Óli Hans Hammer Olsen, fyrrverandi stjóri á Skipaeftirlitinum. Hann umrøddi galdandi lógir, sum hava atlit til sjógvin.

Næstur í røðini var Pál Weihe, yvirlækni, sum tosaði um strongdartekin hjá sjófólki.

Eyðun Joensen sálarfrøðingur, hevði eisini framløgu á evnisdegnum, har hann røddi um viðgerð av skipsbrotnum.

Felags fyri Óla Hans Hammer Olsen, Pál Weihe og Eyðun Joensen er, at teir hava allir drúgvar royndir hvør á sínum øki.

### Tveir útlendingar

Umframt føroysku fyrilestrarhaldararnar, vóru eisini tveir útlendingar bjóðaðir við.

Annar er úr Noregi og hin úr USA.

Norðmaðurin Halvard Aasjord hevur drúgvar royndir frá viðurkenda granskingarstovninum SINTEFF, við serkunleika innan fiski-og alivinnu. Hann tosaði um, hvussu framtíðar fiskiskip kunnu koma at síggja út - við serligum atliti til arbeiðsumstøður.

Steven Callahan úr USA, sum eisini helt fyrilestur á evnisdegnum, er eitt nú kendur úr sjónvarpsrásini Discovery, har hann hevur greitt frá sínari ferð yvir um Altantshavið í sínum seglbáti.

Steven rak nevniliga fyri váð og vind í samfull 76 samdøgur, til fiskimenn úr karibisku oynni Maria Galante funnu hann.

Mongu dagarnir í gummibátinum góðu honum royndir, sum kunnu vera gevandi fyri onnur. Hann hevði vitjan av hávum, hol kom á gummibátin, og hann hevur eisini sína søgu at siga um, hvør dugur er í útgerðini í einum slíkum bjargingarbáti.

Steven Callahan upplivdi á hesi ferðini eisini, hvussu likamliga og sálarliga møðin kom yvir hann.

Endamálið við evnisdegnum var at geva luttakarum eitt amboð aftrat, sum eitt nú kann nýtast sum grundarlag fyri broytingum, bæði á sálarliga økinum, lógarsíðuni - ella á tí verkliga økinum.

Fyriskipararnir siga, at hóskvøldið 1. mai klokkan 19 bjóðar Føroya Shell sínum skipakundum á Hotel Føroyar at líða á tvær frásagnir. Onnur er frá Steven Callahan um ferðina í bjargingarbátinum, og hin er frá Hans Eli Hansen um ferðina hjá sluppini Dart, sum skuldi av Vestmanna til Klaksvíkar á vetrardegi, men rak til havs, uttan mat og vatn.

### Tórbjørn setti

Tað var sum nevnt Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, sum setti evnisdagin í Norð-